gult cyan magenta svart



# Næmingar landa Næraberg

**Skúlastjórin í Ósáskúlanum í Klaksvík hevur givið 45 næmingum frí í tveir dagar, so teir kunnu landa Næraberg, tá hann kemur til Klaksvíkar hósdagin**

FISKIVINNA
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Tá Næraberg kemur til Klaksvíkar hósdagin, er ætlanin, at 45 skúlanæmingar úr Ósáskúlanum skulu verða við til at landa skipið.

Veiðan hjá Næraberg verður løgd upp hjá Northern Fish Cold Storage í Klaksvík, og tað er umráðandi fyri reiðaríið, at skipið verður landað sum skjótast, so tað kann sleppa aftur til fiskiskap.

Tí hevur samband verið millum Ósáskúlan og reiðaríið um at fáa skúlanæmingar at veita eina hjálpandi hond. Stundum stendur á at fáa nóg mikið av fólkið, um arbeiðast skal í fleiri vaktum.



*Fyri at fáa nóg mikið av fólki at landa Næraberg, tá hann kemur til Klaksvíkar hósdagin, hava 45 skúlanæmingar fingið frí, so teir kunnu sleppa til arbeiðis*

### Syrgja fyri vaktunum

Stjórin í Ósáskúlanum hevur játtað, at eini 45 næmingar í 9. flokki sleppa til arbeiðis.

– Eg rokni við, at næmingarnir kunnu læra nógv hesar dagarnar. Hetta er eitt áhugavert samstarv, sum sjálvandi ikki skal misbrúkast, sigur Símun Petur Hjelm, stjóri í skúlanum við Ósánna.

Næmingarnir – bæði gentur og dreingir – dáma væl tiltakið, og tær broytingarnar, sum skulu gerast í vaktunum, skulu næmingarnir sjálvir syrgja fyri.

### Í ES-sjógvi

Næraberg hevur millum 700 og 800 tons av svartkalva og knapt 300 tons av mjøli, og ætlanin er at hetta skal fáa í land sum skjótast.

Næraberg hevur fiskað í ES-sjógvi suðuri ímóti Írlandi.

Ætlanin er, at Næraberg skal fara aftur til fiskiskap leygarkvøldið.

# Pengar til bjarging og kappróður

**Mánakvøldið lat Lions Club í Klaksvík peningagávur til Norðoya Bjargingafelag og Klaksvíkar Róðrarfelag**

GÁVUR
*Eyðun Klakstein*

Lions Club í Klaksvík skipar javnan fyri tiltøkum, har felagið roynir at savna pengar, sum síðani verða latnir sum gávur í Norðoyggjum.

Mánadagin vóru teir í Lions Club út við gávum, og tvey feløg stóðu hesaferð fyri tørni.

Norðoya Bjargingarfelag, sum ætliliga hevur sett ferð á sítt virksemi aftur, fekk annan av kekkunum, og hin varð latin Klaksvíkar Róðrarfelag, sum júst hevur keypt tríggjar nýggjar kappróðrarbátar.

Kekkarnir vóru upp á 30.000 krónur hvør.

### Væleydnað listatiltak

Lions Club hevur skipað fyri ymsum tiltøkum, og helst best eydnaða tiltakið var uppboðssølan av listaverkum hjá kendum føroyingum, sum var hildin í heyst.

Lions Club er heimsumfatandi felagsskapur, sum hevur til endamáls at savna pengar til ymisk endamál.

Bæði í Norðoya Bjargingarfelag og í Klaksvíkar Róðrarfelag vóru tey fegin um gávurnar.

### Kalendari

Norðoya Bjargingarfelag gjørdi fyri stuttum stuðulsavtalu við Norðoya Sparikassa, og felagið hevur eisini fingið nýggjan GPS og VHF frá Contrive í Klaksvík.

Róðrarfelagið hevur skipað fyri nógvum tiltøkum fyri at savna pengar til bátarnar, og tað hevur gingist væl.

Gávurnar hjá Lions komu sera væl við, søgdu formenninir í Bjargingarfelagnum og Róðrarfelagnum.

Næsta tiltakið hjá Lions Club í Klaksvík er ein kalendari fyri 2002. Talan er um ein Norðoyakalendara við myndum úr Norðoyggjum, har vitki og fyritøkur eisini kunnu lýsa.

*Hákun Dam, formaður í Lions Club í Klaksvík, handar Marius Magnussen, formanni í Norðoya Bjargingarfelag, tékk upp á 30.000 krónur*





*Fólk frá Lions Club í Klaksvík og frá Klaksvíkar Róðrarfelag við ein av nýggju bátunum hjá felagnum*

# Bilarnir fóru illa

**Klaksvík:** Eitt ferðsluóhapp í Nólsoyar Pálsgøtu í Klaksvík fríggjadagin hevði við sær, at tveir bilar fóru illa.

Annar av bilunum hevði staðið parkeraður í gøtuni, har nógv ferðsla er allan dagin, og tá hann skuldi út á vegin aftur, legði hann fyri annan bil, og teir brustu saman.

Eingin fólkaskaði var av óhappinum, men bilarnir fingu stóran skaða.